# Flux við nýggjum gittarspælara

**Flux hevur fingið nýggjan gittarspælara og hevur skrivað hópin av nýggjum sangum, sum verða at hoyra á konsert í Klaksvík og í Havn um vikuskiftið**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*



*Flux fer at spæla á konsertum í Klaksvík og í Havn um vikuskiftið. Teir hava fingið nýggja gittarspælara og hava gjørt nógvar nýggjar sangir seinastu tíðina*

Rockbólkurin Flux fer at spæla á tveimum konsertum um vikuskiftið. Fríggjakvøldið verða teir á palli í Atlantis í Klaksvík saman við Clickhaze, og leygarkvøldið spæla teir á gamla Meiarínum í Havn saman við Diatribes.

Flux var við í ársins Prix Føroyar finalu, og har spældu teir sín orkufulla og melodiøsa rocktónleik. Teir vóru eisini við í finaluni fyri tveimum árum, men hvørgu ferðina eydnaðist teimum tó at fáa plasering.

Gittarspælarin, Rasmus Rasmussen, er nú komin við í bólkin, og tað hoyrist á spælinum hjá teimum. Rasmus hevur áður spælt í millum annað Diatribes og Happy, og hann er eisini kendur frá útvarpssendingini, Roykstovan, sum hann hevði eitt langt skifti.

Flux hevur gjørt hópin av nýggjum sangum seinastu mánaðirnar, og tað verður nakað av hesum, sum verður at hoyra á konsertunum um vikuskiftið.

### Fara nú til Klaksvíkar

Clickhaze hevur langt frá verið gerandisgestur í Klaksvík, men nú fara tey at spæla sín sermerkta rocktónleik fyri norðoyingum.

Á konsertini í mentanarhúsinum Atlantis fríggjakvøldið fara Eivør, Petur og hini í Clickhaze at spæla sjálvgjørdan rocktónleik, sum hevur verið væl lýddur á konsertunum kring landið og í útlandinum.

Á konsertini í Havn leygarkvøldið fara Diatribes eisini at spæla. Hesin bólkurin var við í grótharða undanumfarinum í Prix-kappingini í Vági, tá Clickhaze vann og Týr gjørdist nummar tvey.

Hóast tað ikki eydnaðist at koma í finaluna, hava Diatribes tó ikki lagt seg afturá. Teir hava vant nógv og eru nú í gongd við at gera eina fløgu, sum verður upptikin í Føroyum.

Konsertin við Clickhaze og Flux verður í Atlantis fríggjakvøldið klokkan 22.00 Konsertin við Flux og Diatribes verður á gamla Meiarínum í Havn leygarkvøldið kl. 22.00.

# Rókur og Dánjal til Svøríkis at royna seg

**Sangarin og keyboardspælarin í rockbólkinum, Tangz, fara sunnudagin til Svøríkis at ganga á virdum svenskum tónleikaskúla. Teir ætla tó at halda fram við spæla í Tangz, sum er farið undir upptøkurnar til eina nýggja stakfløgu**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*



*– Eg fari persónliga fyrst og fremst eftir at betra meg í tí teoretiska partinum, tí eg havi fingið lítla og onga undirvísing í teori. Eisini vóni eg at kunna betra ymsar teknikkir, sum eg ikki eru nóg góður til, sigur Rókur Jacobsen, sum nú fer til Svøríkis at royna seg á tónleikaskúla*

Rókur Jacobsen og Dánjal á Neystabø fara næsta árið at búleikast nærindis Gøteborg í Svøríki, har teir fara at ganga á tónleikaskúla.

Billstrømska Folkhøgskola er væl dámdur tónleikaskúli, har bíðilistin er langur fyri at sleppa inn. Rókur og Dánjal komu tó ígjøgnum nálareygað í upptøkuroyndini, og í komandi viku byrja teir á skúlanum.

– Vit gera tað fyri at royna nakað nýtt. Tað er vanligt at fara til Danmarkar í slíkum ørindum, men vit hava valt at fara til Svøríkis, tí tað ljóðar minst líka spennandi. Helst fara vit til Danmarkar í øðrum útbúgvingarørindum, so hví ikki royna Svøríki hesaferð, sigur Rókur Jacobsen, sangari í Tangz.

– Svøríki er eitt sera áhugavert land, tá tosað verður um tónleik. Teir taka tónleikin í sera stórum álvara og framleiða nógvan góðan tónleik. Tað hava vit eisini hugsað um, tá vit valdu Svøríki, sigur hann.

### Betra teoretiska partin

Billstrømska Folkhøgskola verður vanliga roknaður sum fyrireiking til tónleikaútbúgvingar á universiteti í Svøríki. Tað ber til at ganga á skúlanum í tvey ár, men Rókur og Dánjal hava ikki gjørt upp við seg sjálvar, um teir verða so leingi í Svøríki.

– Í fyrstu syftu fara vit yvir har í eitt ár. Vit ætla at royna skúlan, og so fæst at síggja, um vit halda fram eftir tað fyrsta árið. Tað er ein spurningur um, hvat vit fáa burtur úr, og hvussu vit fara at trívast har, sigur Rókur Jacobsen.

Umstøðurnar á skúlanum eru góðar. Tað er ikki so kostnaðarmikið at ganga har, tí nógvur stuðul verður veittur skúlanum. Umstøður til at spæla og venja tónleik eru sjálvandi sera góðar, og eisini liggur væl fyri at brúka internetið í gerandisdegnum.

Frálæra er í 35 tímar um vikuna á skúlanum, og so at siga alt hevur samband við tónleik. Einir fýra tímar verða í onkrari bókligari lærugrein, men restin snýr seg onkursvegna um tónleik.

– Eg fari persónliga fyrst og fremst eftir at betra meg í tí teoretiska partinum, tí eg havi fingið lítla og onga undirvísing í tónleikateori. Eisini vóni eg at kunna betra ymsar teknikkir, sum eg ikki eru nóg góður til, sigur Rókur.

– Eg og Dánjal hava spælt eitt sindur av cafétónleiki í Føroyum, og tað verður vónandi okkurt høvi til tað í Gøteborg.

### Halda fast í Tangz

Tangz hevur spælt nógv í ár. Teir vóru við á Prix Føroyum og hava eisini framført fleiri ferðir síðani. At tveir av limunum í bólkinum nú fara uttanlands at ganga á skúla, fer tó ikki at merkja, at Tangz fer í søguna.

– Vit eru samdir um at halda fram við Tangz, og vit ætla eisini at spæla, tá vit fáa høvi til tað, sigur Rókur Jacobsen.

– Tað verður helst eitt sindur øðrvísi næstu tíðina, tí eg og Dánjal verða í Svøríki, men vit ætla at samskifta við hinar í bólkinum um tónleik, og vit ætla eisini at gera okkurt saman, tá feria er.

Tangz er farið undir upptøkurnar til eina útgávu, sum møguliga kemur út í ár. Talan verður um eina stakfløgu við einum fýra sangum, og fyrsti sangurin er so gott sum komin undir land. Hesin sangurin varð tikin upp í Studio Pegasus fyri nøkrum vikum síðani. Helst fer Tangz aftur í studio í heyst at gera fleiri upptøkur.

– Enn vita vit ikki, nær fløgan kemur út, men eg hevði vónað, at vit kundu gjørt hana lidna í heyst. Vit hava tó ikki tosað so nágreiniliga um tað, so vit fáa at síggja, hvussu tað fer at ganga við hesum, sigur Rókur Jacobsen.

– Vit gera eina stakfløgu, tí vit hava ikki umstøðurnar til at taka eina heila fløgu upp beint nú. Vit mangla ikki sangirnar, men tað snýr seg meira um at finna tíð og pengar til at gera eina heila fløgu.

# Grót góða byrjan á útivølli

**Stívliga 60 fólk vóru tilvóru til konsertina við Krit og Marigold í Havn farna leygarkvøld, og tað eru fyrireikararnir í Grót væl nøgdir**

Tónleikasamtakið Grót fekk eina góða byrjan, tá teir skipaðu fyri fyrstu konsertini í høvuðsstaðnum. Higartil hevur so at siga alt virksemið hjá Grót verið í Losjuni í Gøtu, men nú er Grót farið á rull kring landið.

Lagt varð fyri við konsert á Margarinfabrikkini í Havn, og hugnaligu hølini hjá Grímu vóru góður karmur um konsertini. Stívliga 60 fólk vóru til konsertina við Krit og Marigold, sum spældu sjálvgjørdan rocktónleik.

Grót heldur, at tað manglar ein pallur fyri føroyskar tónleikabólkar, sum spæla sítt egna tilfar. Komandi vikuskiftið fer Grót at hava konsert í Atlantis í Klaksvík, har Clickhaze og Flux fara at spæla. Konsertin verður fríggjakvøldið. Leygarkvøldið verður aftur konsert í hølunum hjá Grímu.

**Pop.fo**

# Teitur á ferð í USA

**Føroyski sangskrivarin fer at skriva løg, gera upptøkur og spæla konsetir í New York, Nashville og Los Angeles komandi vikurnar**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*



Mánadagin fór Teitur Lassen til USA, har hann fer at verða næstu vikurnar. Teitur hevur áður verið í USA og fingist við tónleik, og hesaferð liggur leiðin til New York, Nashville og Los Angeles.

Teitur fer at skriva løg, gera upptøkur, og hava onkrar konsertir í stóru amerikansku býnum.

Fyri tveimum vikum síðani kom nýggj stakfløga við Teiti Lassen út í Føroyum. Á hesi útgávu eru tríggir sangir. Ein teirra hevur Teitur skrivað einsamallur, meðan hinar báðar hevur hann skrivað saman við Jeff Cohen.

– Jeff Cohen er sangskrivari úr New York. Hann er helst tann persónurin, sum eg havi skrivað flest løg saman við seinastu tvey árini, sigur Teitur Lassen.

Tá Teitur var heima í vetur, brúkti hann nakað av tíðini í studio, og tað er úrslitið av hesum, sum føroyingar kunnu hoyra á nýggju fløguni.

Tekstirnir í sangunum eru á enskum, og teir snúgva seg um gerandisligar hendingar og støður.

– Heldur enn at finna upp á okkurt tilvildarligt, skrivi eg ofta um hendingar, sum hava sett seg fastar, tá eg geri tekstir, sigur Teitur.



## TILTØK

### Cøliakifelag Føroya

Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

### Nýrafelagið

Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

### Føroya Felag Móti Krabbameini

Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail:
ffk@post.olivant.fo

### Epileptikarafelag Føroya

Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

### Kristnastova

Birmavej 36, København S, tlf. 32551809 fax.32586149
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20. Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis. Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

### Føroyskt møti í Ålborg

Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin. Tit vælkomin at ringja til Annfinn Hjelm, tlf. 29725733.

### Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«

er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

### Malta, Hirtshals

Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

### Evangeliska Røddin, Odense

Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.




**Vika 34 – 22. august**
Vinnaratøl: **03 - 07 - 11 - 17 - 20 - 43**

Eykatøl: **25 - 38**

| | |
|---|---|
| 6 vinnaratøl: | **Eingin vinnari** |
| 5 vinnarat.+ eykatal | **93.518,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **2.752,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **98,- kr.** |
| 3 vinnaratøl: | **27,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VALUTAKURSIR

| | | 22.08.01 | Ultimo juli |
|---|---|---|---|
| USA | **Dollarar** | 806,3800 | 850,6900 |
| Bretland | **Pund** | 1175,7100 | 1213,0000 |
| Týskland | **Markur** | 380,8800 | 380,8000 |
| Svøríki | **Króna** | 78,4500 | 80,4900 |
| Noreg | **Króna** | 91,8300 | 93,2600 |
| Frakland | **Frankur** | 113,5600 | 113,5400 |
| Belgia | **Frankur** | 18,4660 | 18,4630 |
| Sveits | **Frankur** | 490,0500 | 493,0000 |
| Holland | **Gyllin** | 338,0300 | 337,9700 |
| Italia | **Liri** | 0,3847 | 0,3846 |
| Finnland | **Markur** | 125,2900 | 125,2600 |
| Ísland | **Króna** | 8,2400 | 8,4800 |
| Eysturríki | **Skillingur** | 54,1360 | 54,1250 |
| Spania | **Pesetas** | 4,4770 | 4,4760 |
| Portugal | **Escudos** | 3,7160 | 3,7150 |
| Kanada | **Dollari** | 520,5300 | 556,3000 |
| Grikkaland | **Drakmur** | 2,1860 | 2,1860 |
| Japan | **Yen** | 6,7421 | 6,8197 |
| Írland | **Pund** | 945,8700 | 945,6800 |
| | **Evra** | 744,9300 | 744,7800 |

FØROYA SPARIKASSI

## KROSSORÐ



**Vinnari:**
*Jónfríð Foldbo*
*520 Leirvík*

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: ÁSATRÚGVIN



### Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn - og viðmerkið »Krossorðagáta nr. ...« á bjálvan.

**271**

**Loysunarorðið:** ........................

Navn: ........................

Bústaður: ........................

Bygd/býur: ........................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ❑ **Mállæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***